# Sosialráðgevarar til Almannastovuna

Almannastovan søkir eftir sosialráðgevum til Økisdeildina í Klaksvík og í Saltangará.



**Førleikakrøv**
Ert tú sosialráðgevi, ella hevur aðra hóskandi sosiala ella samfelagsliga útbúgving, og hevur tú hug til sosialt arbeiði og vilt verða við til at gera ein mun, so er tað tær vit vilja hava fatur á.

**Starvið**
Sum starvsfólk á Almannastovuni hevur tú ein týðandi leiklut yvirfyri borgarum, tá tað snýr seg um at skapa fíggjarliga og sosiala trygd, at byrgja fyri sosialum trupulleikum og at hjálpa, tá ið trupulleikar koma í.

Vit kunnu bjóða eitt starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum, har møguleiki er fyri persónligari og fakligari menning.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarbólki 6, ella avvarðandi yrkisfelag, um tað fevnir um sáttmálaøkið hjá Almannastovuni.

**Nærri upplýsingar**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Jóan Hendrik S. Samuelsen, deildarleiðara í Klaksvík, á telefon 21 54 87, ella Egil G. Olsen, starvsfólka leiðara, á telefon 21 54 85.

**Umsókn við avriti av prógvum, CV, v.m. skulu sendast til:**
Almannastovuna Smyrilsveg 20,
Postboks 3096, 110 Tórshavn.
Ella við telduposti til
almannastovan@almannastovan.fo

**Freistin**
Umsóknarfreist er mánadagin 3. des. 2008 kl. 12.00.
Vinarliga merkið brævbjálvan:
" Sosialráðgevar til Almannastovu K/S".

Uppgávurnar hjá Almannastovuni eru, við grundarlagi í sosiallóggávuni, at veita persónliga sosiala ráðgeving og vegleiðing, og alment og persónligt at upplýsa um rættindi og skyldur.

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá Almannastovuni er at ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur viðvíkjandi almannaspurningum, at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni og fíggjarligar veitingar. Hartil skal Almannastovan fáa til vega og greina hagtøl til politiska myndugleikan.

almannastovan

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA


# Minnist tú? HEIDERÁÐ v/Poulu Sørensen

*Stuttligt og hugnaligt er tað, sunt er tað eisini og gott fyri sálina, vísa nýggjar kanningar - tað at **minnast** aftur á gamlar dagar saman við øðrum.*

**Skeið fyri eldri..**
Gomul minni eru við til at styrkja heilan, sjálvkensluna og samleikan. Gott er at koma saman og tosa við onnur, sum fegin greiða frá og lurta eftir tí, ið tú minnist.

Kundi tú hugsað tær at komið saman við øðrum, hugna tær við at tosa um og læra av gomlum **minnum**, er hetta skeiðið fyri teg.

**..og skeið fyri starvsfólk**
Londini rundan um okkum hava góðar royndir við at arbeiða við minnisbólkum. Á skeiðnum læra tit, hvussu arbeiðið verður skipað.

**Ken Heap**
Á skeiðnum luttekur 78-ára gamli Ken Heap, ið m.a. er kendur innan arbeiðið við minnisbólkum.

**Ken Heap**, ið tosar norskt, hevur drúgvar praktiskar royndir og ástøðiliga vitan um evnið, sum hann hevur skrivað fleiri bøkur um.

Ken greiðir frá arbeiðnum við minnisbólkum og um, hví minnisarbeiði er gott fyri sálina.

Ken Heap er útbúgvin sosionomur og terapeutur.

**Skráin** fyri skeiðið fæst á tlf. 50 70 88 ella á ps@kallnet.fo

**Skeiðið** verður skipað soleiðis, at eldri og starvsfólk onkuntíð eru saman, meðan starvsfólkini eru fyri seg ein part av tíðini:

**Fyri eldri**
miku-, hós- og fríggjadag 10.00-12.30 og fríggjadag kl. 13.00-16.00

**Fyri starvsfólk**
týs-, miku-, hós-, og fríggjadag 10.00-16.00.

**Stað**
Starvsmannafelagið, J. H. Schrøtersgøta 9, Tórshavn

**Dagar**
20.-23. januar 2009

**Tilmelding**
á tlf. 50 70 88
ella umvegis teldupost: ps@kallnet.fo

**Minst til at tekna teg innan 20. desember!**




NORDCAR
Smiðjugerði 4 · 100 Tórshavn · Tel 30 80 80
nordcar@nordcar.fo · www.nordcar.fo

Tey bestu náa fram, har onnur geva upp



FIAT FIORINO - ÁRSINS VØRUVOGNUR 2009

Kompaktur, rúmligur og økonomiskur. Hetta eru nakrar av orsøkunum til, at Fiorino varð kosin at vera »International Van of The Year 2009« av sakkønum tíðindafólkum úr 20 ymiskum europeiskum londum. Hetta merkir at Fiat Professional hevur vunnið hetta heiti fýra ferðir: Ducato (1994), Dobló Cargo (2006), Scudo (2008) og Fiorino (2009) – t.v.s. 3 vinnarar hesi seinastu 4 árini. Hetta sigur okkum at Fiat Professional hevur megnað at betra góðskuna á vørubilunum og gerandisdagin hjá teimum, ið brúka hesar.

**Longd:** 3.86 m, **venditvørmát:** 9,95 m, **stødd á vørurúmi:** upp til 2,5 m og 2,8 $m^3$.
**Motorur:** Euro4 1,3 Diesel Multijet 75 hk.
**Bensinnýtsla** við blandaðari koyring: 22,2 km/l. $Co^2$ útlát: 119 g/km.

Vørubilar síðan tíðarinnar morgun